# Heim

## Ferðavinnustrategi fram ímóti 2030



Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands

# Innihaldsyvirlit


4 Føroysk ferðavinna í nýggjum skapi

6 Heim
8 Ein nýggjur kapittul
10 Breiða viðgerðin
12 Hvagar gongur leiðin?
14 Ætlan til 2030
22 Stevnumið fram ímóti 2030

24 Føroyska náttúran finnur sínar røtur aftur
34 Heima hjá Harriet Olafsdóttur: Har fortíð og nútíð renna saman
42 Veltan: Rørslan, sum hevur sett sær fyri at lívga siðbundna, føroyska kálhagan
52 Magni Blástein bygdi nýggja vinnu burtur úr gomlu siðvenjuni, at rógva út
58 Vit hitta Rannvá Poulsen, ein teirra, ið myndar føroyska ferðavinnu
64 Vit støkka inn á gólvið í Steinprenti
70 Ferðavinnan í Bø

80 At marknaðarføra Føroyar
82 Føroyar eru UN
84 Fakta um ferðavinnuna
86 Ein ábyrgdarfull ferðavinna
88 Ferðavinnulandslagið



**Útgevari**
Visit Faroe Islands, í Gongini 9
P.O. Box 118, FO-110 Tórshavn
Tel. +298 666 555
www.visitfaroeislands.com
info@visitfaroeislands.com

**Snið**
Sansir

**Prent**
CS Grafisk A/S

**Myndir**
Visit Faroe Islands, Thomas Høyrup Christensen – Frame & Work, Annie Spratt, Ingrid Hofstra, Klara Johannesen, Beinta á Torkilsheyggi, Thrainn Kolbeinsson, Alessio Mesiano, Mads Tolstrup, Chris Riefenberg, Daryl Scott Walker, Guilie Giordi



© Visit Faroe Islands



FSC® www.fsc.org
BLANDING
Pappír frá ábyrgdarfullum veitarum
FSC® C134744



# Føroysk ferðavinna í nýggjum skapi

Føroysk ferðavinna hevur tikið seg nógv fram seinastu árini. Frá at hava verið eitt mestsum ókent og lítið umrøtt ferðamál, sum mangan ikki var at finna á heimskortinum, eru Føroyar vorðnar serstakt og hugkveikjandi land at vitja. Upplivingar, gisting og matgerðarlist eru í heimsflokki – og karmur um alt er okkara vakra náttúra.

Altjóða miðlar skriva um okkara virkishug, mentan og siðir, framfýsnu íverksetarar okkara, sniðgevar og tónleikarar – og lívsstílin her í Norðuratlantshavi. Altjóða fyritøkur, brands og filmsframleiðarar koma higar at fundast ella at nýta bergtakandi náttúru okkara sær sjálvum ella kundum sínum at frama.

So langt eru vit komin – í tættum samstarvi við Føroya Landsstýri, eitt sterkt og framsøkið vinnulív og eina fjøld av heilhugaðum og dugnaligum viðleikarum og eldsálum kring landið alt; her hevur verið arbeitt av øllum alvi, skal sigast, og góðu, nýskapandi hugskotini hava ikki trotið.

Vit hava, stutt sagt, boðið heiminum heim til okkara.

Men í stremban okkara eftir at menna ferðavinnuna, verða vit altíð at hava í huga, hvørji vit eru, og hvar vit eru. Føroyar skulu ongantíð gerast okkurt hissinis ferðamál – ein pallmynd, sum vit sýna skundmiklum ferðafólkum, ið steðga stutt og fara avstað aftur uttan at fáa nakað veruligt burturúr.

Vit eru tjóð við gomlum siðvenjum, ið hava tvinnað okkum saman ættarlið eftir ættarlið og gjørt okkum til tað fólk, vit eru. Sum sannir heimsborgarar kunnu vit stolt sýna øðrum siðmenning okkara.

Føroyar eru heimlandið.

Í hesi ferðavinnuætlan seta vit kós og mál fyri føroyska ferðavinnumenning komandi árini. Grundarlagið er túsundtals samrøður, hundraðtals fundir og frískur íblástur frá samstarvsfeløgum okkara í altjóða høpi.

Í sama viðfangi vilja vit varpa ljós á nøkur teirra, sum eru við til at skapa og menna ferðavinnuna saman við okkum, hvør á sín serstaka hátt. Her hugsa vit um eldsálir um alt landið, sum hava boðið okkum heim til sín og givið okkum innlit í virksemi sítt. Hetta gera vit til tess at vísa, hvussu fjølbroytt føroysk ferðavinna er, men eisini til tess at menna okkum sjálv og geva øðrum hug til at koma inn í ferðavinnuna. Her eru ríkir møguleikar til okkum øll, sum vilja vera í samdrátti um at menna føroyska ferðavinnu, heimlandi okkara at frama.

Góðan lestrarhug.

Vegna Visit Faroe Islands

Johannes Jensen, nevndarformaður

Guðrið Højgaard, stjóri





# Heim

Í Móðurmálsorðabókini eru mangar lýsingar av orðinum ”heim”, eitt nú ”staður, har ein býr”.

Í orðtøkum, yrkingum og orðafellum kemur orðið ofta fyri:

*Heima* er best

*Heim*, kæra *heim*

*Heimið* er har, sum hjartað er

Vit sigla *heim*

# Ein nýggjur kapittul

Fjarstøða okkara á heimskortinum hevur í nógv ár drigið at sær ferðafólk úr øllum heraðshornum, og ferðavinnan hevur verið javnt og samt vaksandi seinastu árini, soleiðis at hon nú er týðandi geiri í føroyska samfelagsbúskapinum. Nakrir føroyingar, tað veri seg umhvørvisverndarfólk, bøndur ella fólk á smáplássum halda nú, at ferðavinnan er vorðin ov stór, og seinastu árini hevur á fyrsta sinni verið talað bæði fyri og ímóti ferðavinnu í Føroyum.

Vøksturin í ferðavinnuni hevur fingið fólk at hugsa, at óskipað ferðavinna kann elva til, at vit missa burtur av sjálvræði okkara, skemma náttúruna og spæla okkum av hondum sumt av tí, sum eyðkennir heimbygdina ella heimlandið.

Hjá Visit Faroe Islands eru vit tilvitað um hesi viðurskifti, sum tó javnt og samt mugu setast í mun til teir greiðu ágóðar, vit fáa av ferðavinnuni. Ferðavinnan hevur skapað arbeiðspláss og vinnumøguleikar kring alt landið, hon hevur knýtt okkum tættari at umheiminum við nýggjum og bíligari flogrutum.

Ferðavinnan hevur eisini givið okkum óteljandi nýggjar mentanarupplivingar og matstovur, sum á nýskapandi hátt nýta føroyskt tilfeingi, og hon er drívmegi í nýskapan og menning á so mangan hátt. Ferðavinnan hevur økt tilvitskuna millum føroyingar um egið tilfeingi og møguleikar her á landi.

Spurningurin er ikki, hvørt vit skulu hava ferðavinnu ella ikki. Víst standa vit í eini tvístøðu, men hon er nógv torgreiddari enn so. Vit skulu nevniliga gera av, hvørja ferðavinnu vit vilja hava, og hvussu ferðavinnan skal gagna føroyska samfelagnum.

Hetta eru spurningar, sum vit ikki kunnu svara sjálvi. Teir krevja eina gjølliga viðgerð og dygt kjølfesti. Á heystið 2022 fóru vit tí undir at fáa samrøðu í lag við fólk, feløg og fyritøkur kring landið um gongdina í ferðavinnuni higartil, hvørji útlitini eru, og ikki minst hvørja leið vit eiga at halda frameftir.







# Breiða viðgerðin

Heystið 2022 og várið 2023 settu vit ymisk tiltøk í verk til tess at útvega okkum nýggjastu vitan og hugskot frá teimum, sum so ella so verða ávirkað av ella arbeiða við ferðafólki í gerandisdegnum. Innsavnaða tilfarið skuldi nýtast til nýggja framtíðarætlan hjá Visit Faroe Islands.

Millum annað fingu vit okkum ein opnan, talgildan postkassa, so almenningurin kundi senda okkum uppskot um, hvussu ferðavinnan kann mennast. Vit skipaðu eisini fyri, at uml. 150 fólk í ferðavinnuni, í øðrum vinnugreinum og samfelagsgeirum, kundu koma saman í kjakbólkar at umrøða framtíðar ferðavinnu. Vit spurdu eisini ferðafólk, hvat tey hildu um føroyaferð sína, og talaðu við lands- og kommunupolitikarar.

Innsavnaða tilfarið úr talgilda postkassanum, frá kjakbólkum, fundum, samskifti og samrøðum kann skiftast sundur í 8 undirevni:

1. Lóggáva og politiskar avgerðir um tær avbjóðingar, sum nú eru í ferðavinnuni.
2. Hvussu ferðafólkatalið kann javnast út á árið.
3. Nissju- og vinnuferðavinna og møguleikarnir, hesin parturin av ferðavinnuni hevur við sær.
4. Burðardygg ferðavinna.
5. Marknaðarføring og branding.
6. Hvussu ferðavinnutilboð kring landið kunnu stimbrast.
7. Vitan, gransking og hagtøl.
8. Undirstøðukervi og flytføri.

Hesi 8 evni eru grundarlag undir teimum átøkum, sum eru raðfest komandi árini. Fleiri evni liggja tó heilt ella fyri ein part uttan fyri ábyrgdarøki hjá Visit Faroe Islands, t.d. lóggáva, politiskar avgerðir ella undirstøðukervi, og eru tí ikki tikin við sum ítøkilig mál í hesi heildarætlan. Tó hava øll hesi fokusøki stóran týdning, og fara vit at arbeiða miðvíst fyri, at øll øki verða tikin upp á røttum stað.

# Hvagar gongur leiðin?

## Føroyar eru meiri enn eitt ferðamál – tær eru heim okkara

Hesin stutti setningur hevur íblástur frá viðgitna skaldinum og umhvørvisverndarmanninum Gary Snyder, ið segði, at “náttúran er ikki eitt stað at vitja. Hon er heimið”.

Tað fær okkum at hugsa um tann sjálvsagda sannleika, sum mangan verður gloymdur, nevniliga at Føroyar eru heimið hjá fólki, sum býr og arbeiðir her, og at her er plantu- og dýralív, ið summpart er so serstakt, at tað ikki er aðrastaðnis og ei heldur kann liva aðrastaðni. Slíkt eigur at verða vart og hjúklað um.

Hetta er kjarnan ella tað, sum gekk aftur sum høvuðsboðskapur í mongu samrøðunum um ferðavinnu, vit høvdu í fjør og í ár, og tí er hetta eisini grundhugsanin, sum stýrir framtíðarætlan okkara.

Ferðavinnan skal altíð gagna heimi, heimbygd, heimbýi og heimlandi okkara. Hon skal ikki gerast endamál í sjálvari sær. Vit skulu ikki slaka, gera neyðsemjur ella broyta heimligu viðurskiftini, tí ferðavinnan skal vaksa.

Hervið taka vit eisini táttin upp eftir menningarætlanina frá 2019, At menna og varðveita um somu leið. Ein munur er tó, at nú er eingin serstøk ætlan um burðardygd við ávísum tiltøkum, sum skulu fremja burðardygga menning. Nú er burðardygd grundhugsjónin í allari ferðavinnuætlanini og sjálvsagdur partur av øllum virksemi okkara, eins og heimsmálini hjá ST eru tað.

Við hesi ætlan stinga vit eina yvirskipaða leið út í kortið fyri ferðavinnuna fram ímóti 2030. Við røttu fortreytunum ber til at røkka hesum langtíðarmálum. Fyri at halda kósina, arbeiðir Visit Faroe Islands við árligum virkisætlanum, sum taka støði í langtíðarmálunum.

Í dag er óvist, hvørjar karmar ferðavinnan hevur at virka undir í framtíðini. Tí røkka flestu av teimum ítøkiligu átøkunum í hesi ætlan bara 2-3 ár inn í framtíðina. Ætlanin er at endurvitja og dagføra ferðavinnuætlanina í 2026, tá vit seta nýggj ferðavinnuátøk á skrá fram ímóti 2030.





## Málið

Í 2030 hevur ferðavinnan gjørt Føroyar, heimland okkara, til eitt betri samfelag sosialt, búðskaparliga og umhvørvisliga.

## Arbeiðssetningurin

er at tryggja, at ferðavinnan er við til at styrkja, sýna fram og varðveita heimland okkara saman við føroyingum, ferðafólki, fyritøkum og felagsskapum.



# Ætlan til 2030

## Eitt styrkt heim

**Ferðavinnan er ein vinnugrein, sum kann styrkja heimstað okkara**, t.d. við at geva einstaklingum og fyritøkum fleiri og betri møguleikar at menna tilboð og vørur, ið byggja á føroyska mentan og samleika. Ferðavinnan skal gagna okkum sosialt og fíggjarliga, og skal brúkast sum amboð til at verja náttúruna.

## Eitt opið heim

**Tað liggur í ferðavinnuni, at vit sýna blíðskap, eru opin, taka ímóti gestum** og lata upp fyri útheiminum. Tað skal gerast við virðing fyri okkara egna samleika og eftir okkara egnu treytum, so at vit ikki missa tað, sum er okkum dýrabart.

## Eitt varðveitt heim

**Ferðavinnan gevur høvi til at varðveita og menna heimland okkara**, náttúru- og mentanararvin, sum er sjálv atdráttarmegin, ið ger, at fólk vilja vitja og búgva í Føroyum.

ÆTLAN TIL 2030

# Eitt styrkt heim

Lykilorðið "heim" verður frameftir týðandi grundarlag undir øllum okkara strategisku átøkum, verkætlanum og samskifti úteftir.



## Til tess at fjálga um heim okkara her í Norðuratlantshavi ætlar Visit Faroe Islands:

### ALT FYRI EITT

at seta í verk átøk, sum menna landbúnaðarferðavinnuna. Verkætlanir verða sjósettar, ið skapa nýggjar vinnumøguleikar og ferðaupplivingar, ið taka støði í landbúnaðinum. Vit síggja fyri okkum tætt samstarv millum ferðavinnu, matframleiðslu/matstovuvinnu og landbúnað við tí endamáli at stimbra marknaðin fyri stuttfluttar vørur.

at seta í verk eitt átak saman við ferðavinnufyritøkum, sum skal menna nýggjar upplivingar og/ella tiltøk uttan fyri høvuðsárstíðina, eisini á hávetri. Harvið verður lívgað um mentanarlívið, tónleikin, matstovutilboðini, listalívið, handilsvinnuna o.s.fr. Málið er, at ferðavinnan alsamt verður ein professionell vinna, sum kann virka alt árið.

saman við kommunum og kunningarstovum, verður bygnaðurin í ferðavinnuni endurskoðaður, við tí fyri eyga, at fáa betri samskipan og samstarv um menningarátøk kring landið

### FYRI 2024:

at taka stig til og seta í verk eina verkætlan, sum hevur til endamáls at fáa fleiri dygdargóðar sølulutir ella tinganest, sum á einhvønn hátt umboða mentan okkara, siðvenjur og søgu.

at fáa netverkið 'Vælkomin heim' at virka. Hetta netverk er fyri fólk, sum arbeiða í ferðavinnuni, og hevur til endamáls at hækka tænastustigið. Tað snýr seg eisini um at betra samskiftið við ferðafólk, so tey hava so góðar fortreytir, sum til ber, at vísa neyðug fyrilit, tá ið tey vitja her.

at menna og marknaðarføra vinnuferðavinnu við tí fyri eyga at brúka serligt fundarsnið til ráðstevnur og fundir, kallað 'Unordinary Meetings'. Málið er, at Føroyar verða mest nýskapandi landið á hesum øki. Til ber at røkka hesum máli við at brúka náttúru og mentan okkara og knýta bond millum okkara, sum búgva her, og vinnuferðafólk.

### FYRI 2025

at halda fram at menna vørur og tilboð, ið kunnu verða sett í samband við lykilorðið "heima". Her verður hugsað um heimaframførslur, heimablídni, binding og hevdbundna frásøgulist.

at víðarimenna havferðavinnu og taka stig til hóskandi vinnuligt virksemi á hesum øki (fiskiskapur, kajakkróður, róðrarbátar, kaving o.a.). Føroyar eru umgyrdar av havi, so møguleikarnir eru nógvir.

### FYRI 2026

at seta í verk landsfevnandi góðskuváttan innan føroyska ferðavinnu, ið hevur lykilorðið "heima" sum grundarlag. Góðskuváttanin skal viðurkenna heimavirkaðar vørur og staðbundnar tænastur, so at lættari verður hjá ferðafólki at taka burðardyggar avgerðir.

ÆTLAN TIL 2030

# Eitt opið heim

Vit fara áhaldandi at marknaðarføra eina trúverda ímynd av Føroyum, bæði viðvíkjandi vanligari frítíðarferðavinnu og vinnuferðavinnu, og verður tað gjørt í tættum samstarvi við ferðavinnuna sum heild. Soleiðis styrkja vit støðu okkara á heimsmarknaðinum sum eitt dragandi ferðamál hjá teimum, sum elska náttúru og mentan, men eisini teimum, sum dáma at ferðast í arbeiðshøpi og vilja geva av vitan og førleikum sínum í Føroyum.



## Visit Faroe Islands vil, at Føroyar verða eitt opið, gestablítt heim, og tað verður gjørt við:

### ALT FYRI EITT

at halda fram at fáa miðlar og myndafólk henda vegin, sum eru áhugað í at siga frá og vísa søguna um okkum, sum búgva her, okkara mentan og gerandisdag fyri á tann hátt at røkka útlendingum, sum eru áhugaðir í júst hesum.

at skipa fyri marknaðarátaki í okkara grannalondum, ið hevur til endamáls at fáa ferðafólk til Føroya í lágárstíð.

at seta í verk vinnuferðavinnuátak, sum leingir um vertíðina. Vinnuferðafólk verða eggjað til at steðga longur, soleiðis at tey taka nakrar eyka frídagar í Føroyum. Hetta verður gjørt við at vísa á mentanar- og ítróttar-upplivingar í Føroyum uttan fyri háárstíð.

at seta í verk nýtt átak á sosialum miðlum, sum lýsir lívið hjá fólki kring landið. Tað verður gjørt í samstarvi við ein fjølbroyttan skara av føroyingum, sum fáa høvi at fortelja um og vísa heiminum Føroyar við støði í sínum gerandisdegi.

at laga "un-brandið" (unspoiled, unexplored, unbelievable) til, har dentur er lagdur á fólkið, mentanina, fjarstøðu, tað ektaða umframt náttúruna.

at menna og seta í verk nýggjan "What's on"-netpall til tess at kunna betur um mentanartiltøk og annað áhugavert virksemi kring landið. Netpallurin skal vera bæði ferðafólki og føroyingum til gagns.

at menna eina tjóðarhagtalsskipan í samstarvi við Hagstovuna (sovnevnda Tourism Satellite Account – TSA) við regluligari hagtalsinnsavning um ferðavinnuna. Vit fáa nógv meiri vitan um ferðavinnuna í Føroyum, og tað verður soleiðis eitt týðandi stýriamboð frameftir.

### FYRI 2024

at styrkja og menna okkara ambassadørnetverk við einum greiðum málsetningi og kørmum fyri, hvussu ráðstevnur og tiltøk leggja varandi virði í føroyska samfelagnum. Búskaparliga eins og við vitan, nýskapan og netverki.

at byrja eitt marknaðarátak við Havnini sum miðdepli við áherðslu á mentanar- og tænastumøguleikarnar í býnum.

at halda ferðavinnustevnu á hvørjum ári í Føroyum, har ferðavinnufyritøkur og aðrir viðkomandi partar hittast til at menna samstarvið, knýta netverk, breiða út nýggja vitan um m.a. altjóða rák í ferðavinnu og burðardygga ferðavinnumenning.

at leggja okkum eftir at fáa ráðstevnur higar um eitt nú lívfrøðiligt margfeldi, umhvørvismál og veðurlags-broytingar, og eisini onnur stór tiltøk, sum á einhvønn hátt geva mentan okkara eitt jaligt íkast.

ÆTLAN TIL 2030

# Eitt varðveitt heim

Vit viðurkenna, at vit eiga at gera alt, vit kunnu, fyri at verja okkara fyrsta og fremsta ferðavinnutilfeingi: náttúruna. Okkara náttúra er ein av fremstu orsøkum til, at ferðafólk koma til landið. Vit skulu eisini hjúkla um okkara mentan og siðaarv, ið ger okkum til eina serstaka tjóð í Norðuratlantshavi.



## Til tess at varðveita heimland okkara fer Visit Faroe Islands:

### ALT FYRI EITT

at taka gisting og annars allar tænastur við grønari góðkenning framum, millum annað tá ið ráðstevnur verða fyriskipaðar, og tá ið skipað verður fyri átøkum í Føroyum og uttanlands. Hesir veitarar og tænastur verða eisini gjørd sjónligari á okkara heimasíðu.

at halda fram at menna, dagføra og styrkja flaggskip okkara 'Closed for Maintenance' í samstarvi við kunningarstovur, borgarar, kommunur, fyritøkur og áhugafeløg.

at geva føroyingum høvi at koma lættari til orðanna í ferðavinnumálum. Tað kann m.a. gerast við at varðveita opna, talgilda postkassan, so fólk altíð kunnu senda inn uppskot til loysnir ella siga sína hugsan.

### FYRI 2024

at víðka um heildarætlanina fyri leiðbeining og kunning, so ferðafólk hava bestu fortreytir at bera seg rætt at úti í náttúruni. Hetta verður framhaldandi gjørt í samstarvi við kommunur, bøndur og viðkomandi myndugleikar.

at taka stig til. at greiningar um náttúruvernd o.a. verða gjørdar (í samstarvi við avvarðandi myndugleikar), skipa fyri ráðstevnum og/ella tiltøkum um hesi evni og við slíkum átøkum at virka fyri, at vit fáa ein tjóðgarð ella tveir.

at gera enn fleiri hagagøtur við nýggjum gøtuverkætlanum á støðum, har nógv ferðafólk fara.

### FYRI 2025

at seta í gongd eina ella fleiri royndarverkætlanir saman við Strandfaraskipum Landsins og øðrum viðkomandi pørtum við tí endamáli at fáa fleiri ferðafólk at nýta almennu samferðslumøguleikarnar, tá ið tey vitja land okkara.

### FYRI 2026

at taka upp samstarv við Fróðskaparsetur Føroya og serfrøðingar um at menna eitt háttalag, ið kann geva okkum nágreiniligari vitan um tað árin, ferðavinnan hevur á náttúru, umhvørvi, samfelag og búskap.

at útgreina, hvat best dámdu ferðamálini tola (carrying capacity), og við støði í tí gera tilmæli um hóskiligar avmarkingar í ferðafólkatali, og hvussu ferðafólkastreymurin kann stýrast sum best.

# Stevnumið fram ímóti 2030

### Umsetningur í kr.

**1,5 mia.**

Ferðavinnan í Føroyum er lutfalsliga lítil enn, og búskaparliga burðardygg ferðavinna krevur størri umsetning, serliga uttan fyri háárstíð. Í 2030 skulu vit kunna siga, at ferðavinnan er vaksin støðugt og í javnvág við samfelagið.

### Ferðafólk um flogvøllin í lágárstíð

**50%**

Ein fortreyt fyri støðugum og betri ferðavinnutænastum er, at ferðafólkatalið verður meiri javnt býtt út á árið. Nú vitja yvir 60% av teimum útlendsku ferðafólkunum Føroyar í summarhálvuni, frá mai til septembur, og minni enn 40% vitja Føroyar frá oktobur til apríl.

### Størv í ferðavinnuni

**1000+**

Ferðavinnan fer framhaldandi at bjóða fram nýggj størv, til kvinnur, ungfólk, ígongdsetarar o.o. Tað skal vera gott at starvast í ferðavinnuni, og tað skal bera til at leggja sær spennandi og fjølbroytta starvsleið í ferðavinnuni.

### Føroyskur ognarskapur í ferðafyritøkum

**80%**

Í 2030 verða tað framhaldandi føroyskar fyritøkur, sum reka og menna føroyska ferðavinnu. At ferðavinnan verður varðveitt á føroyskum hondum er avgerandi fyri eina burðardygga ferðavinnu.





### Ferðavinnuveitarar hava ein burðardyggan politikk

**100%**

Ferðavinnan skal ganga á odda í grøna skiftinum. Ferðavinnuveitarar verða eggjaðir at orða politikk og gera mannagongdir fyri burðardygd skjótast gjørligt. Ein samlað føroysk ferðavinna stendur saman um eina felags burðardygdartilsøgn í 2030. Í 2030 skulu Føroyar eisini vera á norðurlendskum miðaltali í GDS burðardygdarindeksinum.

### Tal av fólkum, ið halda, at ferðavinnan samanumtikið hevur jalig árin á samfelagið

**80%**

At føroyingar taka undir við ferðavinnuni og meta hana vera eitt gott íkast til føroysku samfelagsmenningina er altavgerandi. Vit fara áhaldandi at taka føroyingar við upp á ráð, vit fara at kunna betur um ferðavinnuna og eggja borgarum til at gerast partur av ferðavinnuni. Hugburðurin til ferðavinnuna verður javnan kannaður.

# Føroyska náttúran finnur sínar røtur aftur

2023 kann gerast merkisár, hvat náttúru og náttúruvernd viðvíkur. Í vár samtykti Føroya Løgting nýggja lóg um náttúruvernd, soleiðis at avvarðandi myndugleikar av sínum eintingum kunnu taka stig til at verja náttúruna, tá ið hildið verður, at áneyðir eru fyri tí. Tað er væl hugsandi, at Koltursætlanin, sum hevur til endamáls at gera alla oynna til tjóðgarð og útisavn, er fordømi um nýggju kósina.





Bjørn Patursson





Í Føroyum eru mangar náttúruperlur, sum bergtaka okkum, útlendingar sum føroyingar. Ikki man vera skeivt at siga, at tað fyrst og fremst er náttúran, sum dregur ferðafólk higar til lands.

Vit mugu tíverri viðurkenna, at vit ikki vita nóg mikið um tey skaðiligu árin á føroysku náttúruna sum heild, sum longu eru veruleiki. Vit vita heldur ikki, hvørji langtíðarárinini verða – fyri ferðavinnuna og lívið í Føroyum í breiðari merking.

Tað sindrið, vit vita um hesi viðurskifti, sum nú er, er gomul vitan, ið ikki hevur verið dagførd, og harafturat er henda vitan alt ov grunn.

"Sannleikin er, at vit vita ov lítið um føroyska náttúru, og tað er álvarsamt í sjálvum sær. Eingin ivi er tó um,



Magnus Gaard, lívfrøðingur

at lendi við serstøkum eginleikum eru minkað nógv seinastu 100 árini, eitt nú heiðalendi og vátlendi. Tað síggja vit týðiliga á myndum tiknum úr luftini, sum vit kunnu samanbera við gamlar myndir," sigur Magnus Gaard, lívfrøðingur og stjóri á Miðnámi í Vestmanna, har serstakur dentur verður lagdur á náttúru og tilfeingi.

## VANTANDI VITAN

Magnus Gaard hevur brennandi áhuga fyri føroyskari náttúru og hevur granskað, undirvíst og verið íðin talsmaður fyri náttúruvernd. Fyrst í øldini tók hann lut í arbeiðinum at skipa ein føroyskan umhvørvisverndarstovn. Tó at ikki gekk, sum ætlað, eydnaðist at fáa til vega týdningarmikla vitan um føroyska náttúru. T.d. tók Magnus lut í arbeiðinum at gera higartil einasta listan yvir hótt plantu- og dýrasløg í Føroyum og at geva tilmæli um at verja ávís náttúruøki. Síðani er hvørgin listin dagførdur á nøktandi hátt.

"Hetta merkir, at tey, sum royna at verja náttúru okkara, mugu arbeiða út frá 20 ára gomlum upplýsingum," sigur Magnus Gaard, "og eingin ivi kann vera um, at støðan er nógv broytt hesi árini."

Hann vísir eisini á, at vit vita lítið og einki um langtíðarárinið av seyðahaldi í serstøkum økjum ella lendi.

Føroysk náttúra er vøkur at eygfara, men vit mugu ikki gloyma, at hon hevur í sær eina viðbrekna javnvág, og skeiklast hon, kann tað fáa avleiðingar langt fram í tíðina. Vátlendini eru gott dømi um tað. Tey hava tann sjáldsama eginleika at kunna draga í seg og goyma kolevni í langsamiliga tíð. Við øðrum orðum hava vátlendini týdning, nú ið um ræður at minka avleiðingarnar av veðurlagsbroytingum.

*Sannleikin er, at vit vita ov lítið um føroyska náttúru, og tað er álvarsamt í sjálvum sær. Eingin ivi er tó um, at lendi við serstøkum eginleikum eru minkað nógv seinastu 100 árini.*

**MAGNUS GAARD**

Føroyar eru knappliga 1400 ferkilometrar, so sjálvt smáar umhvørvisbroytingar ella inntriv í náttúruna kunnu fáa stóra ávirkan og sera skaðiligar avleiðingar.

## ER TÍÐIN NÚ KOMIN TIL NÝHUGSAN?

Higartil hevur verið lítil áhugi fyri hóttum plantu- og djórasløgum og serstøkum náttúruøkjum, sum minka ella hvørva. Men nú, vit skriva 2023, bendir ymiskt á, at ein nýggjur hugsanarháttur vinnur fram, og at verulig stig fara at verða tikin til at verja føroysku náttúruna. Í vár var náttúruverndarlógin dagførd, soleiðis at myndugleikarnir nú hava betri amboð til at verja umhvørvið.

Í gomlu náttúrufriðingarlógini var heimild at friða øki, men heimildin er bara brúkt tríggjar ferðir í 53 ár. Tá hon er brúkt, hevur tað altíð verið fyri at steðga onkrari ítøkiligari byggiætlan og ikki grundað á náttúruvirðir, vit eru samd um at varðveita í Føroyum. Nýggja lóggávan gevur myndugleikunum møguleika at verja náttúruøki av sínum eintingum við atliti at lívfrøðiligum margfeldi, náttúruvakurleika ella øðrum viðurskiftum, sum gera, at eitt øki verður mett vert at varðveita," greiðir Magnus Gaard frá.

Hvønn mun henda lógarbroyting fær í veruleikanum, fáa vit nú at síggja, leggur hann afturat; men fyrsta dømið um slíka náttúruvernd er longu í gongd og tað avgerandi verður játtanin, landstýrisfólkið letur til endamálið.

## FØROYA FYRSTI TJÓÐGARÐUR

Ætlanirnar úti í Koltri eru vónandi fyrsta stig á leiðini. Har í oynni, sum er 2,5 ferkilometrar til støddar, er nógv tann største náttúruverndarætlanin í Føroyum higartil komin væl ávegis. Tjóðsavnið fór undir hesa ætlan í 2018, og snýr hon seg um at gera Koltur til tjóðgarð og útisavn við einum ferðafólkadepli.

Koltur er sera væl egnað til endamálið. Koltur er næstminsta oyggj í Føroyum, og liggur rættiliga avbyrgd. Tí er hon eisini væl vard ímóti nýggjum plantu- og dýrasløgum, og so er hon manntóm stóran part av árinum (meiri um tað seinni).

Oyggin umboðar væl tað, sum annars er at finna í føroyskari náttúru. Í øðrum endanum er 477 metrar høgt fjall, Uppi á oyggj, væl vallað oman móti bygdini øðrumegin, og hinumegin er berg. Í hinum endanum á oynni er Fjallið, sum, hóast navnið, er nógv lægri. Í ringum veðri er rættiliga harðført, og eins og í Hesti gongur nógv á harúti um vetrartíð, bæði vindur, regn og brim.

Hetta er so tað fyrsta, okkum kemur til hugs viðvíkjandi náttúruviðurskiftunum í Koltri; men síðan







2019 eru fleiri hundrað sløg av plantum, fuglum og ryggleysum dýrum skrásett harúti. Hetta sigur nógv um, hvussu stórt lívfrøðiliga margfeldið er í Føroyum, tá farið verður at kanna. Eisini vísa hesar skrásetingar hjá Tjóðsavninum, hvussu lítið hevur verið rannsakað, og hvussu nógv vit enn hava eftir at læra um lívið í náttúru okkara.

“Vitanin, vit vinna okkum úti í Koltri, kann gerast sjálvt grundarlagið undir gransking av føroyskum vistskipanum,” greiðir Leivur Janus Hansen frá. Hann er lívfrøðingur og stendur fyri Koltursætlanini hjá Tjóðsavninum.

Leivur og starvfelagar hansara eru í holt við at gera eina uppgerð yvir alt lív í oynni. Tey festa á kort og eygleiða plantu- og dýralívið. Hetta er fyrsti partur av verkætlanini, sum gongur frá 2021 til 2023. Við tíðini verða bygdir ein framkomin granskingardepil og ein ferðafólkadepil. Almenningurin fer at kunna koma út í Koltur við ávísum avmarkingum, og stór øki skulu fáa loyvi til at liggja í friði.

“Møguleikarnir í Koltursætlanini eru ikki smávegis, bæði í mun til gransking og frálæru, men eisini í breiðari høpi. Í framtíðini fer Koltur at vera partur av lestrarætlanum innan skúlaverkið, og vit fara at fáa eina betri fatan av, hvussu náttúran var her á landi fyri landnám. Vit fara frá ástøði yvir til nakað, sum er ítøkiligt og sjónligt,” sigur Leivur Janus Hansen.

Sambært Magnusi Gaard kann Koltursætlanin ikki metast nóg høgt:

“Koltursætlanin fer at hava sera sterka ávirkan. Føroyingar eins væl og ferðafólk halda helst, at landið altíð hevur sæð út, sum tað nú ger, men so man ikki hava verið, tí mannahond hevur verið á tí mesta, og tí er mesti parturin av landinum mentanarlandslag. Verkætlanin fer helst at gerast fyrimynd fyri aðrar varðveitingarætlanir, og nýskapandi vinnumøguleikar kunnu spyrjast burturúr. Umframt at byggja ferðafólkadeplar, skipa fyri spennandi ferðum við ferðaleiðara o.a., mugu vit eisini læra at bera okkum meiri ábyrgdarfult at í náttúruni,” sigur hann.

## SØGAN UM KALL, KONU OG KOLTUR

Prófvast er, at fólk hevur búð í Koltri síðan landnámsøld. Fornfrøðiligar rannsóknir vísa, at bygg hevur verið velt har í 9. øld, og síðan tá hevur fólk búð í oynni. Tey gomlu húsini í Koltri eru helst tillagaðar útgávur av víkingaaldarhúsunum, sum niðursetufólkini bygdu sær, og at varðveita hesi hús er sjálvsagdur partur av Koltursverkætlanini.

Men yngsta søgan um Koltur snýr seg um eini hjún og, ja, ferðavinnu. Bjørn og Lükka Patursson hava nú búð í Koltri í ein mansaldur. Tey hava eini lítil hús, sum liggja nakrar 100 metrar frá víkingaaldarbýlinginum.

Um so er, at føroyingar kunnu sigast at vera nakað treiskir viðhvørt, sum oyggjabúgvum líkt, ja, so ber til at siga, at Bjørn og Lükka hava lyft hendan eginleika upp á hægri stig.

“Minnist, at eg las í bløðunum, og var tað um 1990, at seinastu fólkini vóru flutt úr Koltri, og at bygdin tískil var avtoftað. Henda nýggja støða í Koltri bleiv partur av almennum kjaki um mentanararv okkara, tí greitt var longu tá, at gomlu húsini í Koltri vóru verd at varðveita. Nú stakst upp á meg, at eg skuldi prógva, at væl ber til at liva undir slíkum umstøðum,” sigur Bjørn Patursson, spurdur um, hvussu tað hugskot kyknaði upp, at hann og konan skuldu flyta út í Koltur, sum tey eisini gjørdu í 1994.

*Møguleikarnir í Koltursætlanini eru ikki smávegis, bæði í mun til gransking og frálæru, men eisini í breiðari høpi.*

**LEIVUR JANUS HANSEN**

Hann var millum teirra fyrstu, sum fekk áhuga fyri búnaðarferðavinnu, og sá hann ríku møguleikarnar úti í Koltri. Skrivaði tí opið brævtil myndugleikarnar, har hann beyð sær til at festa oynna. Heystið 1993 undirritaði hann festibrævið, og tey bæði, Lükka, fluttu út 1. januar 1994.

Avtalað var, at tey skuldu átaka sær hesa stóru uppgávu eitt ár í senn, og restin er nútíðarsøga.

"Vit fóru beinanvegí holt við landbúnaðarferðavinnu, og til okkara kom ferðafólk úr øllum heraðshornum. Tey sluppu við okkum á seiðaberg, at fleyga lunda og tóku eisini eina hond í við okkum í arbeiðinum á garðinum. Vinnuliga sæð var hetta nýbrot, og mær var tað til stóra gleði at sleppa at sýna týskarum ella bretum siðbundna lívið her í Føroyum; men tað vóru ikki øll her í landinum, sum hildu, at hetta var nakað at ganga og fjasast við."

Umframt at røkja festið og taka ímóti ferðafólki, tóku tey táttin upp at halda á við at umvæla og endurbyggja gomlu húsini og úthúsini, tí tey sóu, at tað trongdi harðliga til og kundi blíva eitt gott aktiv í ferðavinnupartinum. Hetta gjørdu tey í samstarvi við myndugleikan og arkitektarnar Palle Dyreborg og Poul Jensen, sum frammanundan høvdu holla vitan um búsetingina í oynni. Soleiðis byrjaði henda sonevnda Koltursætlan, og var náttúruvernd týðandi partur av ætlanini frá fyrsta degi. Framtíðarhugsan teirra fyri Koltur er síðan ment á ymsan hátt til ta ætlan, sum Tjóðsavnið frá 1. januar 2015 hevur borið ábyrgd av. Tað er hent hetta seinasta tíggjuáraskeiðið, sum hevur verið merkt av samráðingum, royndum at útvega fígging og kjaki um, hvør besta leið var at ganga til tess at fáa ætlanina so góða sum møguligt.

Burtursæð frá fáum tíðarskeiðum, har tey ikki vóru í oynni, uml. 2010 og 2015, hava Bjørn og Lükka verið fastbúgvandi í Koltri og tikið lut í allari tilgongdini at fremja Koltursætlanina. Tá oyggjarvarðarstarvið so í 2014 var lýst leyst, søkti Bjørn Patursson um at sleppa at halda fram at taka sær av oynni undir nýggju skipanini, og var tað honum játtað. Tí búgva tey enn í oynni.

"Vit sóu skjótt, hvussu dýrabar oyggin er, bæði tá hugsað verður um náttúru og mentanararv, og tí vildu vit eisini vera við í verkætlanini sum longst. Vit eru nú í eini skiftistíð, har vit kunnu gera góðan mun við hollu vitan okkara um oynna. Tá ið komið er á mál við ætlanini, fara vit at hugsa um at taka upp annan tátt."

*Fyrsti partur av Koltursætlanini er fíggjaður av Aage V. Jensens Fonde, men neyðugt verður at finna fígging til íløgur og tað, sum restar í, og til tað virksemi, ið verða skal, tá komið er á mál.*





## VIÐMERKING RITSTJÓRANS:

Lítil ivi er um, at ferðafólki stendur føroysk náttúra fremst í huga. Men Føroyar eru meiri enn vakurt landslag. Her eru viðbreknar vistskipanir, og her eru plantu- og djóralív og fólk. Tí eigur hvør og ein at bera virðing fyri, hvørt tað er føroyingur ella útlendingur.

Ein ætlan sum Koltursætlanin ber framá, og áður enn langt um líður fara vit at hava holla vitan um, hvussu støðan í føroysku náttúruni er. Harafturat fara vit at læra, hvussu frægast er at verja og varðveita náttúruna og mentanararvin, soleiðis at vit við góðari samvitsku kunnu njóta og nýta heimland okkara.



# Heima hjá Harriet Olafsdóttur av Gørðum: Har fortíð og nútíð renna saman

Harriet Olafsdóttur av Gørðum og maður hennara, John av Gørðum, hava bæði jørð og seyð at røkja - og gistingarhús. Tey bjóða ferðafólki at uppliva og fáa innlit í føroyska bygdarmentan og eru framúrskarandi umboð fyri føroyskt gestablídni. Vinnuliga sæð eru tey komin rættiliga langt, og tað er samanrenningin millum siðvenju og nýskapan, sum ger munin.

Harriet Olafsdóttur av Gørðum sigur seg vera íverkseta, bónda og stjóra í lítlu fyritøku teirra. Jú, sanniliga renna fortíð og nútíð saman í Hanusarstovu. Har á garðinum bjóða hon og maður hennara ferðafólki ból og bita. Hús teirra standa skamt frá sjóvarmálanum í Æðuvík.

Tey gera eisini mat til ferðafólk, og at uppliva tað er eins spennandi og at fara út at eta á matstovu. Gistingarhúsið er væl vitjað, og tey sýna fegin fram alt tað, ið á garðinum er. Liggjandi gestir fáa eisini høvi til at taka lut í dagliga arbeiðinum, um tey hava hug.

"Haldi næstan, at vit hava funnið nútíðina í fortíðini. Vit hava tikið uppaftur fornar arbeiðshættir og handverk, men eisini nútímansgjørt bóndalívið," sigur hon.

Sethúsini vóru bygd í 1898 og høvuðsumvæld í 2014, tá ið unga parið flutti inn. Tey varðveittu so nógv, sum til bar, av húsum og úthúsum, men bygdu so eisini upp í sethúsini. Tað bleiv gjørt í minimalistiskum, norðurlendskum stíli, og tað er gistingarhúsið.

*Haldi næstan, at vit hava funnið nútíðina í fortíðini. Vit hava tikið uppaftur fornar arbeiðshættir og handverk, men eisini nútímansgjørt bóndalívið.*







*Hevdbundna seyðahaldið í Føroyum er í flestu førum frítíðarítriv. Mong hugsa bara um at fáa kjøtið upp at hanga og hava seyð, tí tað er siðvenja. Eg droymdi altíð um at verða fulltíðar seyðabóndi.*



## SEYÐAVINURIN

Tað, sum fyrst fangar eygað í Hanusarstovu, er seyðurin. Ikki bert tí at hann gongur beint uttan fyri vindeyguni og fer so róligur, etandi oman á bakkan, har snipst er niður í kolblátt hav. Við hús sleppur seyðurin upp eftir eini serbygdari rampu, har hann kann standa og gløa inn í gistingarhúsið eftir ferðafólki, og so er bara at gløa aftur.

Harriet hevur eisini ódeyðiliggjørt seyð sín við at taka óteljandi myndir og gera tær til vøkur postkort, sum vera seld og send um allan heim. Ein heilur veggur í gistingarhúsinum er prýddur við plakatum og postkortum hennara.

At seyður er so nógv at síggja bæði úti og inni hjá Harriet, er ikki av ongum, tí djóraverndarsinnað er hon, og tað við lít. Plakatirnar av seyði í vøkrum umhvørvi hava stundum fingið fólk at finnast at henni fyri at vera í so romantiserandi, hvat seyðahaldi í Føroyum viðvíkur; men hon himprast ikki við at finnast at umstøðum ella arbeiðsháttum, har dýravælferðin er í vanda. Eitt nú hevur hon talað at, tá ið seyður má klára seg sjálvan í rúma tíð, uttan at nakar hyggur til hansara.

“Hevdbundna seyðahaldið í Føroyum er í flestu førum frítíðarítriv. Mong hugsa bara um at fáa kjøtið upp at hanga og hava seyð, tí tað er siðvenja. Eg droymdi altíð um at verða fulltíðar seyðabóndi, og tað eri eg nú. Í høvuðsheitum havi eg megnað tað við at nútíðargera og tillaga seyðahaldið og við at fara betur við seyðinum,” sigur hon.

## VINNULÍVSKONAN

Latum okkum lata tað romantiska liggja á hesum sinni, tí Harriet er vinnulívskona av besta slag. Heimalambið Elias hevur vunnið teimum 150.000 kr. hesi síðstu trý árini. Inntøkan kemur partvíst av plakatum og postkortum av Eliasi og annars tí, at Harriet hevur eina heilt serstaka "fosturlambsskipan."

Eftir hesi skipan kunnu fólk úti í heimi "ættleiða" ein seyð ella eitt føroyskt ross og gjalda fyri part av tí, tað kostar at hava at hava seyðin/rossið. Djórini verða verandi hjá teimum í Hanusarstovu, og nýggju eigararnir fáa javnan myndir – eisini livandi myndir – sum sýna, hvat tey havast at um dagarnar, og hvussu tey hava tað.

"Skal eg fáa seyðahaldið at bera seg, er neyðugt at leggja alla orku í tað, og tað kostar at hava seyðin. Hann skal hava fóður, heilivág og má røkjast væl. Tað tekur nógva tíð, og ikki hevði verið hugsingur um at fáa tað at mala runt, uttan at endurhugsa røktina, og hvussu vit liva saman við dýrunum," greiðir hon frá.







## VIÐMERKING RITSTJÓRANS:

Tað er hugtakandi at síggja, hvussu eldsálir endurhugsa føroyska siðvenju og ganga nýggjar leiðir, so at ferðafólk fáa møguleika at verða við. Harriet og Hanusarstova eru lýsandi dømi um, hvussu ferðavinna kann skapa nýggjar møguleikar og fyritøkur, sum bera seg og mennast, samstundis sum fornur lívsstílur verður varðveittur.

# Veltan: Rørslan, sum hevur sett sær fyri at lívga siðbundna, føroyska kálhagan

Stutt lýsing av rørsluni, ið vil hava føroyingar at velta grønmeti og urtir, eins og tey gjørdu fyrr.





Joannes Johannessen



”Ruskspannir vóru ikki til heima hjá okkum, tá eg var barn.”

Hetta barndómsminni hjá Jóannesi Johannessen, bónda í Miðstovu á Sandi, er meira enn eitt minni úr farnari tíð. Undir orðum hansara býr fatanin av, hvussu stórar broytingar eru farnar fram innan matmentan og -framleiðslu hesar seinastu tríggjar ættarliðirnar. Eins og pápi sín hevur hann velt rættiliga nógv epli til at selja. Hann er sandoyingur og limur í Veltuni, einum felag, sum bøndur, óðalsbøndur, traðarmenn og aðrar eldsálir hava stovnað



við tí fyri eyga at fáa føroyingar at velta sítt egna grønmeti.

“Fyrr vóru føroyingar mestsum sjálvbjargnir við grønmeti. Ikki var tað tí, at vit høvdu risastórar garðar og ídnaðarlandbúnað, men heldur tí, at flestøll høvdu kálgarð ella kálhaga. Hetta er grundhugsanin hjá okkum í Veltuni,” sigur hann og vísir á brúkaramentanina, ið skolaði inn yvir allan vesturheim í 1960-árunum. ”Tá tók alt at broytast hasum viðvíkjandi,” sigur hann.

Her í Føroyum var ídnaðargerð innan landbúnað komin sera stutt á leið fyri ikki so langari tíð síðan. Tá ið fólk fóru at gevast at hava kálgarðar ella kálhagar, varð farið at innflyta mestsum alt grønmeti, og soleiðis er enn. Men vantandi ídnaðargerð forðaði ikki fyri, at tey gomlu veltu rættiliga nógv grønmeti. Undir fyrra veraldarbardaga útfluttu føroyingar meiri av eplum, enn teir innfluttu. Eplaneyð var í Íslandi, tí teir fingu ikki vøru úr útlondum krígsárini. Tá kom eplaútflutningurin úr Føroyum teimum væl við.

Øll vita, at Sandoy er landbúnaðaroyggin í Føroyum. Í navninum liggur júst, at har í oynni er nógv sandjørð, har sera gott er at velta epli; men eisini onnur sløg av grønmeti vaksa væl har, t.d. kálrabi, gularøtur, leykur, reyðrøtur, rósukál og várleykur. Limir í Veltuni hava reist vindverjur, so grønmetið fær lívd. Tey hava gjørt royndir við at turka grønmeti so mikið, at tað goymist sum best, og mangar aðrar royndir til at vita, hvussu grønmeti fæst at vaksa sum frægast undir okkara harðføru umstøðum. Tey bygdu eisini ein vakstrarhústunnil, 300 fermetrar til støðdar, sum hevur roynst væl.

"Vit kunnu aftur gerast sjálvbjargin við grønmeti, um vilji er til tess, eisini uttan at byggja risastór vakstrarhús. Satt at siga er betri, at vit eru mong, sum framleiða grønmeti, um hvør einstakur ikki framleiðir so nógv, tí stór vakstrarhús hóska illa til føroysk viðurskifti. Tað kann tykjast eitt sindur tvørvent, men verða kann, at vit mugu innflyta alt møguligt annað, um farast skal undir stórframleiðslu av grønmeti," greiðir Jóannes Johannessen frá.

Tó at enn er langt á mál, tá ið ræður um at vera sjálvbjargin við grønmeti, sæst virksemið hjá Veltuni og øðrum eldsálum aftur í føroyskari matgerðarlist. Spyrt tú Karina Visth, víntænara og matstovuleiðara á KOKS, ROKS og Ræst, kann hon siga frá, at seinastu 10 árini er hent rættiliga nógv innan grønmetisframleiðslu í Føroyum:

"Fyri 10 árum síðan bar næstan ikki til at fáa hendur á føroyskum grønmeti, so annaðhvørt máttu vit strika grønmeti úr matskránni ella flyta tað inn. Nú er nógv meiri fjølbroytni í matskráum okkara, samstundis sum allir rættir okkara eru vorðnir enn meira ektaðir, tí føroysk grønmetisframleiðsla er ment so nógv," sigur hon.

Sambært Karini Visth, sum vaks upp úti á bygd í Sveis, verða matstovur og grønmetisframleiðarar at arbeiða tætt saman, og grønmeti má í mongum førum bíleggjast so mikið sum eitt ár, áðrenn tað verður latið matstovunum, tí avgrøðin er ikki stór, og summarið er stutt.

"Øll vita, at tað krevur nógv at fáa flestu sløg av grønmeti at vaksa her, sum føroyska veðurlagið nú einaferð er, og stóri trupulleikin er, at lítið og einki

*Fyrr vóru føroyingar mestsum sjálvbjargnir við grønmeti. Ikki var tað tí, at vit høvdu risastórar garðar og ídnaðarlandbúnað, men heldur tí, at flestøll høvdu kálgarð ella kálhaga. Hetta er grundhugsanin hjá okkum í Veltuni.*

**JÓANNES JOHANNESSEN**

verður framleitt meginpartin av árinum. Tað hevði verið eitt risastórt stig frameftir at fingið tað at bera til, men so mugu fleiri vakstrarhús byggjast. Eg flutti higar, tí eg sá stórar møguleikar innan føroyska matgerðarlist, og hugsaði eg tá serstakliga um fisk og skeljafisk. Nú hendir alt møguligt spennandi innan grønmetisframleiðslu, og tað gleðir meg at vera partur av menningini," sigur Karin Visth.

Jóannes Johannessen og Veltan selja longu grønmeti til bestu matstovur í landinum og eru sostatt við til at





sýna ferðafólki, hvat føroysk matmentan og matgerðarlist hava at bjóða. Nógvir føroyingar keypa eisini grønmeti frá teimum. Tað eru mest eldri fólk, sum vilja halda fast um føroyskar siðvenjur, og ungfólk, sum eru tilvitað um at eta stuttfluttan mat.

Hann heldur, at vit fara at síggja eina grundleggjandi broyting í hugsanarhátti hesum viðvíkjandi, tó at tað kann taka eitt sindur av tíð.

"Nú royna vit at gera Veltuna til eina landsumfatandi rørslu, tí higartil hevur tað í stóran mun snúð seg um Sandoy og nakrar fáar aðrar bygdir. Í royndum okkara at fáa fleiri at framleiða grønmeti royna vit at vekja áhuga millum fólk, sum rógva út og fáast við heimavirki av ymsum slag, men sum ikki fáast við tað fulla tíð. Á tann hátt fáa vit sýnt fram og selt aðrar føroyskar vørur enn grønmeti. Hetta hongur jú alt saman."



*Fyri 10 árum síðan bar næstan ikki til at fáa hendur á føroyskum grønmeti, so annaðhvørt máttu vit strika grønmeti úr matskránni ella flyta tað inn. Nú er nógv meiri fjølbroytni í matskráum okkara.*

**KARIN VISTH**

## VIÐMERKING RITSTJÓRANS: HVÍ ER HENDA SØGAN TIKIN VIÐ?

Hjá Visit Faroe Islands royna vit alsamt at finna nýggjar hættir at skapa arbeiðspláss – innan sjálva ferðavinnuna eins væl og í samstarvi millum ferðavinnufyritøkur og einstaklingar ella fyritøkur í øðrum vinnum. Vit stremba eftir at styrkja føroyskar siðvenjur og vilja meiri enn fegin hava, at felagsskapir sum Veltan verða partur av átøkum okkara og teirri góðu søgu, vit føroyingar hava at siga.

Heimavelt grønmeti er týðandi partur av føroyskari matgerðarlist og matmentan. Slík framleiðsla er eisini ein spurningur um ábyrgd, tí best er at flyta sum mest av vøru sum stytst, og tað munnu oyggjabúgvar flestir eisini sanna á.

Tískil snýr nýggja ferðavinnuætlan okkara seg í stóran mun um at skipa eina landbúnaðarferðavinnu, sum fer at skapa nýggjar vinnumøguleikar og upplivingar fyri ferðafólk á markamótinum millum ferðavinnu, mat og landbúnað.

Vit síggja, at nýggju matstovurnar, sum koma við ferðavinnuni, vilja hava stuttfluttar vørur á tallerkarnar. Tað er hetta, ferðafólkini vilja hava, og tað er her, góðu søgurnar um matin eru. Ferðavinnan økir sostatt eftirspurningin eftir stuttfluttum rávørum, hon skapar grundarlag fyri burðardyggari landbúnaði og einum størri, lokalum vøruúrvali, okkum øllum at frama.









# Magni Blástein bygdi nýggja vinnu burtur úr gomlu siðvenjuni, at rógva út

Útróður er bæði siðvenja og vinnugrein í Føroyum, og mangir eru teir føroyingar, sum enn rógva út, meiri og minni. Onkur hevur til stuttleika sagt, at ein føroyingur, sum ikki passar seyð í frítíðini, hann fer út at rógva.










Magni Blástein í Vestmanna er fiskimaður, eins og pápin; men so fann hann upp á at bjóða ferðafólki við sær til útróðrar við 20-tonsara sínum og fekk tað at bera til.

Vestmanna er ein av bestu náttúruhavnum í Føroyum, og haðani slepst bæði norðureftir og suðureftir.

“Pápi mín var fiskimaður alt lívið, og eg fór eisini tann vegin; sum árini gingu, gjørdi eg mær royndir við ymsum skipum. Eg visti einki um tráðufiskiskap við báti fyrr enn í 1999, tá ið eg tók lut í eini NGO-verkætlan í Kuba,” sigur hann.

Har fekk hann hugskotið til “Fishing with Blástein”, eina fiskivinnufyritøku, sum bjóðar bólkum umborð á útróðrarbát sín, Blástein, við honum sum skipara, ið hevur loyvi til at taka 12 fólk. Tað snýr seg nógv um upplivingina og at vera saman, ja, meiri enn um fiskiskap og veiðinøgd; men sigast skal, at stutt er úr Vestmanna á góðar fiskileiðir, har tú fært skrubbu, tungu, reyðsprøku, tosk og hýsu, umframt alt møguligt annað gott.

“Hetta er heilt annað slag av fiskiskapi enn tann, eg vaks upp við. Hevdbundin fiskiskapur snýr seg mest um nøgd og prís, men hetta slagið av fiskiskapi snýr seg í stóran mun um góða samveru, og ferðin í sjálvari sær hevur eins stóran týdning og fiskiskapurin,” greiðir Magni Blástein frá.





*Hetta er heilt annað slag av fiskiskapi enn tann, eg vaks upp við. Hevdbundin fiskiskapur snýr seg mest um nøgd og prís, men hetta slagið av fiskiskapi snýr seg í stóran mun um góða samveru.*

Tað ber til at siga, at “Fishing with Blástein” er fjórði vinnuvegur hansara á lívsleiðini. Fyrst var hann fiskimaður, so teldufrøðingur, síðan tók hann BA í hugmyndasøgu og kandidatprógv í søgufrøði. Hann veit alt um heimbygdina, har hann vaks upp, frá elstu søguni til nútíðina.

Nú fæst hann aftur við fiskiskap, men núverandi virksemi snýr seg eins nógv um íverksetan og ferðavinnu.

Magni Blástein hevur saman við øðrum havt stóra ávirkan á ferðavinnuna í Vestmanna. Umframt øll tey mongu ferðafólk, sum hava fiskað við Blástein, hevur hann við virksemi sínum fingið fleiri hundrað fólk at gista í Vestmanna á hvørjum ári. Hann bjóðar fólki ból og bita, men mong hava gist aðrastaðni í bygdini, sum merkir, at eisini onnur fáa inntøkur av virksemi hansara.





## VIÐMERKING RITSTJÓRANS: HVAT FÁA VIT BURTUR ÚR HESARI SØGUNI?

Hjá Visit Faroe Islands vita vit væl, at havið uttan um okkum gevur ríkar møguleikar fyri at menna ferðavinnuna á ábyrgdarfullan hátt, og við slíkum virksemi, sum Magni Blástein hevur bygt upp, verður trýstið av ferðavinnu á gerandisdagin hjá fólki á landi og nógv vitjað øki tað minni.

Magni Blástein er slóðbrótari á hesum øki, men tað ber væl til at gera annað á havinum enn at fiska. Her hugsa vit t.d. um kajakkróður, seglbátar, jollur o.a.

Til tess at stimbra menningina av hesi grein av ferðavinnu okkara og skapa nýggjar møguleikar fyri føroyskt vinnulív, hava vit í hesi nýggju ferðavinnuætlan okkara gjørt av at gera eina royndarverkætlan, sum snýr seg um júst havferðavinnu.





# Vit hitta Rannvá Poulsen, ein teirra, ið myndar føroyska ferðavinnu

Rannvá Poulsen er verkætlanarleiðari hjá 62°N. Sum ung flutti hon sjálv úr Føroyum, men hon er heimafturkomin og roynir nú at fáa ferðafólk at koma hendan vegin.









“Tá eg gekk í skúla, hevði eg brennandi útlongsul, men nú er vent í holuni, tí Føroyar eru nógv broyttar í mun til tá, ikki minst takkað veri ferðavinnuni, sum hevur skapað nýggj størv av ymsum slag og givið okkum møguleika fyri einum meira nútíðarbærum lívsstíli. Eg kenni mong, sum eisini fluttu út í heim, men eru komin heim aftur – eins og eg,” sigur Rannvá Poulsen.

Hon tók miðnámsprógv í 2008 og gjørdi dreym sín til veruleika. Tá flutti hon til Týsklands fyrst sum au pair og síðani at lesa týskt, enskt og russiskt, men so fór hon at lesa og arbeiddi sum ferðaleiðari, meðan hon var heima í summarfrí lestrarárini. Eina hálvárið av lesnaðinum var Rannvá eisini í starvslæru hjá eini vinnuferðavinnufyritøku í Barcelona.

“Eg umhugsaði at verða verandi uttanlands, men fjøllini og havið drógu meg heim aftur. Sum ferðaleiðari kom eg at síggja heimlandið við “gestsins eygum” og sá tá Føroyar úr heilt øðrum sjónarhorni. Tað fekk meg at virðismeta Føroyar meira enn áður, og óivað hevur tað eisini fingið meg til at flyta heim aftur,” sigur hon.

## HEIMA AFTUR

Rannvá flutti heim 2014, og síðan tað hevur hon arbeitt seg uppeftir innan føroyska ferðavinnu. Fyrst arbeiddi hon sum tænari og barrvørður á hotelli. Haðani fór hon at arbeiða hjá eini ferðaskrivstovu, har hon alt fyri eitt fór í holt við at arbeiða við vinnuferðavinnu, sum var tað, sum hon alla tíðina ætlaði sær.

*Tá eg gekk í skúla, hevði eg brennandi útlongsul, men nú er vent í holuni, tí Føroyar eru nógv broyttar í mun til tá.*




*Vit eiga ikki at síggja ferðavinnuna sum eitt endamál í sjálvum sær, men heldur at hugsa um, hvussu ferðavinnan kann gagna samfelag okkara.*

Nú arbeiðir hon við vinnuferðavinnu fyri aðra fyritøku, 62°N. Hetta er ikki gomul ferðavinnugrein í Føroyum, men menningin gongur skjótt. Ferðafólkini, sum her verður hugsað um, eru nógv øðrvísi enn vanlig ferðafólk.

Rannvá Poulsen heldur at stórir, ótroyttir møguleikar eru innan hesa ferðavinnugrein, og at her er rúm fyri nýggjum og nýskapandi fyritøkum, sum kunnu bjóða hesum slag av ferðafólki serstakar og spennandi upplivingar. Talan er bæði um einstaklingar og bólkar. Eftirspurningurin eftir slíkum tænastum er stórliga vaksin seinastu árini, men tá ið hon leggur til rættis ferðina saman við mongu viðskiftafólkunum hjá 62°N, kundi hon hugsað sær ein væl longri lista við tilboðum at senda teimum. Hon og starvsfelagar hennara á hesum øki eru tilvitað um, at her er nógv at vinna, tí aðrastaðni eru tey komin nógv longri enn vit við slíkum tilboðum.

“Vit eiga ikki at síggja ferðavinnuna sum eitt endamál í sjálvum sær, men heldur at hugsa um, hvussu ferðavinnan kann gagna samfelag okkara. T.d. er ferðavinnan grundarlag undir mongu, fínu matstovunum, kaffistovunum og mentanartilboðunum, vit hava fingið seinastu árini, og henda vinna hevur fingið mangar føroyingar at síggja heimland sítt úr øðrum sjónarhorni, sum m.a. sæst aftur í, at føroyingar í stórum tali eru farnir at ferðast innanlands,” sigur Rannvá Poulsen at enda.





## VIÐMERKING RITSTJÓRANS

Í orðaskiftinum um føroyska ferðavinnu verður hon mangan fatað á úrtøkiligan hátt ella sum eitthvørt fyribrigdi. Havast skal tó í huga, at ferðavinna okkara eisini er ein týðandi vinnugrein, har mangar eldsálir leggja tíð, evni og alla orku í at geva Føroyum so gott umdømi, sum møguligt, og hava tey eisini valt at starvast innan ferðavinnuna til tess at geva ferðafólki góðar upplivingar. Hetta kemur føroyska búskapinum og øllum samfelagnum til gagns.

Stundum gloyma fólk hendan veruleika í ferðavinnukjakinum, sum mangan snýr seg um ferðafólkini heldur enn føroyingar.

# Vit støkka inn á gólvið í Steinprenti

Steinprent er føroyska orðið fyri “litografi”, og tað er eisini navnið á verkstovu og framsýningarhøli, sum danski litografurin Jan Andersson og føroyska listakvinnan Fríða Matras Brekku standa fyri. Steinprent flutti til Føroya í 1999, og har hittast mong listafólk og eldsálir úr Føroyum og útlondum.





Jan Andersson, eigari og litografur



Fríða Matras Brekku, listafólk



Eigarin og litografurin Jan Andersson vil helst ikki hava, at fólk síggja Steinprent sum ein stovn. Men um hugsað verður um teir listaligu úrmælingar úr Norðurlondum og Evropa annars, sum hava skapað stór listaverk niðri í Steinprenti, er ikki av leið at nýta tað orðið. Herfyri arbeiddi sjálvur Bjørn Nørgaard har.

Tað sigur ikki einki, at Steinprent hevur verið til í fjórðingsøld. Virksemið var fyrst í høli Listasavns Føroya og síðani í leigaðum hølum í hugnaliga, gamla virkisbygninginum á Skálatrøð.

"Føroyingar hava ans fyri at varðveita og stuðla mentan og list, ja, tað er ikki mangastaðni, tú finnur nakað tilsvarandi, serstakliga tá hugsað verður um, hvussu fáment tjóðin er. Tað er hugtakandi at uppliva, hvussu livandi áhugin fyri list er millum fólk," sigur Jan Andersson, sum flutti til Føroya í 1999.

*Útvið helvtin av søluni hjá okkum stavar frá útlendskum ferðafólki. So tað ber til at siga, at ferðavinnan hevur avgerandi týdning fyri virksemið á Steinprenti.*

**JAN ANDERSSON**





*Føroyingar hava ans fyri at varðveita og stuðla mentan og list, ja, tað er ikki mangastaðni.*

**JAN ANDERSSON**

Sambært Jan Andersson leita alt fleiri føroyingar sær oman í Steinprent. Helst hava mong hildið, at Steinprent bara er verkstova, og vistu ikki, at Steinprent eisini er alment framsýningarhøli.

Listaliga skapanin í Steinprenti er úrslit av góðum samstarvi millum Jan Andersson og dugnaligar samstarvsfelagar, sum eru sannir listahandverkarar, og vitjandi listafólkini. Fyrst teknar listafólkið verk sítt á kálkstein, sum er serliga ætlaður til steinprent, og so verða nøkur fá, serstøk, áritað, talmerkt listaverk prentað.











## VIÐMERKING RITSTJÓRANS:

Jan Andersson og listahandverkararnir, sum har starvast, eiga æruna av, at Steinprent hevur hepnast so væl. Tey hava framúr evni til at skilja tey listafólk, sum koma til teirra at skapa síni verk. Nevnast skal eisini, at Steinprent ber vitni um ta støðu, list hevur í Føroyum, og hvussu stóra virðing føroyingar bera fyri mentan og list. Steinprent er sanniliga vert at vitja, og har kunnu ferðafólk fáa eina greiða fatan av hesum sterka listaliga og mentanarliga áhuga millum føroyingar.





# Ferðavinnan í Bø

Júst sum Atlantsflog dansar í skýnum, tá tað nærkast okkara heimlandi yvir Sørvágsfjørð, sæst helst stórbærasta sýnið í Føroyum, Tindhólmur, Gáshólmur og Drangarnir. Síðani ljóðar sjarmerandi tónin í flogfarinum, ”Góðu ferðafólk, vælkomin heim”, til føroyingar eins og forvitin ferðafólk. Hetta er fyrsta møtið við lítlu bygdina, Bøur, har ferðafólk kenna seg sum heima.

### BØUR – BYGDIN SUM BJÓÐAR GESTUNUM HJARTALIGA "VÆLKOMNUM".

Har savnast nýhugsandi fólk, ein royndarmynd av einum blómandi samstarvi millum tey, ið búgva her, í samvinnu við náttúruna, siðvenjuna og ferðavinnuna. Í hesum lítla bygdarlagi hava vit sæð eina framgongd seinastu árini, eitt nú við spírandi og fjøltáttaðari vinnu og útboði, m.a. veitingarstøð, bátsferðir, stuttfluttar matvørur, landbúnað og gistingarhús. Hesi hava á hvør sín hátt sæð møguleikar í vaksandi ferðavinnuni og kunnu gagnnýta hesar á egnan hátt, við týdningarmiklum stuðli og samstarvi frá íbúgvum.

*Tað er týdningarmikið, at tað eru fólk á staðnum, sum reka ferðavinnu í tøttum samstarvi við nærumhvørvið, tað ger, at bygdarfólkini hava ein jaligan hugburð, og at vit lurta eftir teimum, tá okkurt er minni gott, og síðani gera tillagingar.*

**JENNY, FJÓSIÐ**







*Eg hevði kunnað bygt fleiri smáttur aftrat, men hjá mær býður tað eitt sindur ímóti, tí so missi eg sambandið við gestirnar, og staðið missir sína sjarmu – heldur fáa góðskuna upp og møguliga bjóðað fleiri tænastur, eitt nú at bindikonur úr bygdini binda troyggjur eftir bílegging, ella at gestirnir kunnu taka sær epli upp úr veltuni og egg úr høsnarhúsinum.*

**TRÓNDUR, THE VIEW**

Tað er sera áhugavert at skilja og kenna, hvussu ferðavinnan kann vera við til at savna eina bygd sum Bøur.

Ein teirra, vit fingu orð á, er Tróndur Niclasen, ið saman við familjuni í 2017 fór undir at byggja fýra smáttur at leiga út sum gistingarhús. Hesar eru í dag eyðkendar og eru aloftast bókaðar eitt ár frammanundan.

Eitt nú sigur Tróndur: "Tá eg fór í holt við hetta, so vóru tað tríggjar fortreytir: 1. at tað skuldi vera í føroyskum stíli í tráð við náttúruna. 2. at eigaraskapur skuldi vera í familjuni. 3. at øll í bygdini skuldu siga tummil upp fyri verkætlanini."





*Tað ger ferðavinnuna eitt sindur fátækari, um vit ikki hava hesi lokalu plássini, har ein líka kann koma inn og fáa sær ein bita.*

**HELGA, PAKKHÚSIÐ Í BØ**

Eisini fingu vit prát við Jenny Guttesen, sum nýliga hevur sett á stovn veitingarstaðið, Fjósið, ið er ætlað til veitslur, fundir og annað virksemi. Helga Nordendal, sum í mong ár hevur veitt tænastur í søguliga Pakkhúsinum í Bø, og at enda oddamannin handan "A view 2 Sea", Eystein í Løðu, sum ger serstakar túrar við báti fyri ferðafólk. Tað er eyðsæð, at skal ferðavinnan hava eina jaliga ávirkan á bygdina, so mugu tillagingar gerast í samstarvi við ferðavinnuveitarar. Eitt nú hava bygdarfólkini gjørt av at heita á ferðafólk at seta bilarnar á parkeringsøkið og ganga í bygdini og njóta bygdina og friðin heldur enn at koyra ígjøgnum bygdina. Tey hava eisini sett seg í samband við ferðavinnuveitarar og sagt, at tey ikki vilja hava bussvitjanir sunnudagar.





*Tað sær gott út við gongdini á ferðavinnuni, og ein kann tí verða jaligur ... tað er óivað nokk til øll, tað snýr seg bert um at vera kreativur.*

**EYSTEIN, BLUEGATE / A VIEW 2 SEA**





# At marknaðarføra Føroyar

Ein av yvirskipaðu uppgávunum hjá Visit Faroe Islands er at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál á altjóða marknaðum.




Marknaðarføringin hevur síðstu árini havt fokus á at leingja árstíðina og selja Føroyar sum ferðamál alt árið. Endamálið er at tryggja, at allir partar av ferðavinnuni kunnu vera virknir alt árið, og harvið tryggja støðug arbeiðspláss. Hetta verður m.a. gjørt við at menna vinnuferðavinnu við ráðstevnum, fundum og mentanarligum tiltøkum, sum oftast liggja uttan fyri háárstíð.

## MARKNAÐIR

Visit Faroe Islands hevur síðstu nógvu árini arbeitt við at marknaðarføra Føroyar á nøkrum fáum útvaldum marknaðum. Vit hava fyrst og fremst raðfest teir marknaðir, sum liggja tætt við, har vit kunnu ganga út frá, at kunnleikin til Føroyar er lutfalsliga størstur, og tað harvið er lættast at fáa fleiri ferðafólk skjótt. Tey síðstu árini hevur burðardygd eisini verið ein grundgeving fyri at raðfesta marknaðir, sum eru tætt við Føroyar, soleiðis at ferðafólk ikki skulu ferðast alt ov langt fyri at koma til Føroya. Teir marknaðir, sum hava verið raðfestir, eru Norðurlond, Stóra Bretland, Týskland, Frakland og USA. Onnur lond í Evropa, sum vit eisini arbeiða í, eru Italia, Holland og Spania.

## MÁLBÓLKAR

Umframt at velja ávísar marknaðir at arbeiða á, so er marknaðarføringin eisini málrættað móti ávísum málbólkum. Endamálið er at røkka fólkum, sum veruliga vilja koma til Føroyar, og sum eru áhugað í tí, sum vit hava at bjóða. Tað kann vera alt – upplivingar í náttúruni, gongutúrar, fiski- og siglitúrar, kajakkróður, róðrarbátar, kaving o.s.fr. og eisini at læra okkum, sum búgva her, betur at kenna. Heimablídni og HOYMA-konsertir eru góðir møguleikar hjá okkara gestum at hitta fólk, sum búgva her. Umframt fantastiska náttúru, so kunnu Føroyar bjóða alt frá gistingarhúsum við 4 stjørnum, matstovum, sum eru nevndar í Michelin guide'ini, til list, tónleik og sniðgeving á altjóða støði og møguleikan at fara heim til fólk at eta og lurta eftir tónleiki.

## PR

Visit Faroe Islands keypir ikki lýsingar í altjóða bløðum. Í staðin verður arbeitt miðvíst við at fáa útlendskar miðlar til Føroya, so tey kunnu skriva greinar um Føroyar sum ferðamál, har stórur dentur eisini verður lagdur á matstovur, list, sniðgeving, tónleik og aðra mentan.

Harumframt hevur Visit Faroe Islands tey síðstu árini havt í miðal eitt stórt átak, sum hevur til endamáls at skapa umrøðu um Føroyar í útlendskum miðlum. Sheep View, Faroe Islands Translate og Remote tourism eru dømi um nøkur av hesum átøkum.

## INSTAGRAM

Á sama hátt verður arbeitt við at fáa myndafólk at koma at taka myndir til Instagram-pallin hjá Visit Faroe Islands. Eisini her verður arbeitt við at fáa myndafólk, sum duga at siga søgur um okkum, sum búleikast her, umframt um okkara stórbæru náttúru.

Instagram hevur nevniliga víst seg at vera ein sera góður máti at fáa myndir av Føroyum út í heim, og tann pallurin hevur verið brúktur nógv seinastu árini. Eisini á instagram verður roynt at eggja ferðafólkum at bera seg skilvíst at, tá tey eru í Føroyum, ikki at fara ov langt út á tromir, at ganga eftir uppmerktum gøtum o.s.fr.

## ÚTLIT

Hóast ein kundi trúð tí, so selur Føroyar ikki seg sjálvt. Kappingin á altjóða ferðamarknaðinum er sera hørð og er harafturat eisini munandi herd seinastu árini eftir korona. Vit hava í løtuni ikki tann vøkstur sum londini rundanum okkum hava.

Ferðafólkini sum vitja um okkara leiðir, leita eftir náttúru, frískari luft, friði og mentanarupplivingum. Hetta kunnu nógv onnur lond eisini bjóða teimum. Skulu vit eisini framhaldandi standa okkum í kappingini, er tað av størsta týdningi, at Føroyar eisini framyvir eru sjónligar á ferðamarknaðinum, við effektivari marknaðarføring. Eisini er tað sera týdningarmikið at gestirnir fáa eina góða uppliving í Føroyum, so at teir kunnu vera við til at breiða kunnleikan um Føroyar sum ferðamál.

# Føroyar eru UN

Tá Visit Faroe Islands fekk nýtt brand í 2013, tað, sum verður kallað un-brandið, var útgangsstøðið afturmeldingar frá yvir 5.000 ferðafólkum, sum vóru biðin um at lýsa Føroyar. Tað sást skjótt, at besti mátin hjá teimum at lýsa Føroyar var at seta 'un' framman fyri orðini. Við orðunum "Unspoiled, Unexplored, Unbelievable" og við einum "un" frammanfyri í lykilorðum í lýsingartekstum verður markerað, at Føroyar er nakað, sum tú ikki hevur upplivað fyrr. Harvið skilur ferðamálið Føroyar seg frá teimum "størri og betri." Føroyar eru serstakar í sjálvum sær og øðrvísi enn øll onnur.

Endamálið við brandinum er at sameina ferðavinnuna í ein felags boðskap, soleiðis at Føroyar sum ferðafólkaland standa sterkari og blíva meira sjónligar.

Í sambandi við arbeiðið at orða nýggja ferðavinnustrategi fyri Føroyar sum ferðamál er brandið dagført. Litir og stavsnið hava flutt brandið fram til 2023, og væntanin er, at dagføringin fer at gera, at brandið kann brúkast nógvu næstu árini.

Kanningar, sum eru gjørdar av ferðafólkum, vísa, at okkara gestir taka undir við brandinum, og at tey eru samd í, at Føroyar kunnu marknaðarførast sum 'Unspoiled, Unexplored and Unbelievable'. Endamálið er, at okkara gestir halda fram við at taka undir við hesum boðskapinum.

Brandið er samstundis eitt lyfti til komandi ættarlið um, at vit vilja menna Føroyar sum ferðamál, so tær blíva við at vera Unspoiled, Unexplored and Unbelievable.






# Fakta um ferðavinnuna

Ferðavinnan hevur veitarar runt alt landið og støddin er alt frá einmansfyritøkum til fyritøkur við fleiri hundrað starvsfólkum. Útyvir teir hundraðtals veitarar, ið eru í ferðavinnuni, fáa túsundtals føroyingar harafturat partvísa inntøku frá ferðavinnuni, gjøgnum stutttíðarútleiðan, ferðaleiðing, heimablídni o.a.

## Umsetningur

**900**

mió. kr. í 2022

## Útflutningsvirði

**900**

mió. kr. í 2022

## Partur av útflutningi

**6%**

í 2022

## Bruttovirðisøking

**347**

mió. kr. í 2022

## Ársverk

**646**

í 2022

## Talið av ferðafólkum í 2022



# Ein ábyrgdarfull ferðavinna

Visit Faroe Islands ásannar, at ferðavinnan hevur ávirkan á samfelagið, menniskjuni og náttúruna, vit virka í. Stór mál kunnu bert náast, um vinna og myndugleikar samstarva.

Og tískil vilja vit hava gjøgnumskygni í okkara virksemi. Vit vilja eggja til burðardygga menning og vøkstur tó uttan, at tað natúrliga tilfeingið versnar fyri komandi ættarlið.

Arbeitt verður bæði eftir stutttíðar- og langtíðarmálum. Vit miða eftir at arbeiða í samsvar við hesi níggju ST-heimsmál.

15 LIFE ON LAND

Náttúra og Umhvørvi

## Lívið á landi

**VIT VILJA:**

- varðveita vátlendi og verja lívfrøðiliga margfeldið.
- steðga avmerging av náttúru og oyðimarkarlendi. Hetta gera vit við virkið at fara inn í verkætlanina hjá Tjóðsavninum, stuðla henni og bjóða hana fram sum ein møguleika hjá ferðafólkum at gera okkurt gott fyri samfelagið. Eisini vilja vit bjóða vátlendisøkir fram til Closed For Maintenance-átakið.

6 CLEAN WATER AND SANITATION

Náttúra og Umhvørvi

## Reint vatn og reinføri

**VIT VILJA:**

- skapa virðing fyri reinum vatni í Føroyum. Vit styðja upp undir eina virðiliga nýtslu av vatni og arbeiða fyri, at ferðavinnan ikki verður ein bági í sambandi við vatnnýtslu.
- at ferðavinnan er við til at tálma vatnnýtsluni, og at spillvatn verður rætt viðfarið og í mest møguligan mun fer í sirkulerar rakstrarskipanir. Hetta verður m.a. gjørt við, at kranar, brúsur og ves nýta so lítið vatn sum gjørligt.
- at øll ferðafólk ókeypis kunnu fylla sína egnu vatnfløsku á frámerktum støðum. Vit nýta kranavatn til øll okkara tiltøk og fundir.

13 CLIMATE ACTION

Náttúra og Umhvørvi

## Veðurlagsátøk

**VIT VILJA:**

- styðja upp undir tann veðurlagspolitikk, sum Føroyar og alheimssamfelagið hava sett sær fyri.

4 QUALITY EDUCATION

Menniskju og Margfeldi

## Dygdargóð útbúgving

**VIT VILJA:**

- arbeiða fyri dygdargóðum útbúgvingum og hava eina vinnu, sum bjóðar lívslanga læring.
- hækka førleikastøðið í okkara vinnu, bæði hjá ungum og eldri, so tey hava dagførdar og relevantar førleikar og útbúgvingar. Eisini vilja vit, at øll skulu hava møguleika til at vera við í førleikamenningini, soleiðis at munurin verður minni millum menn, kvinnur, aldursbólkar, fólk við serligum tørvi, etniskan uppruna o.s.fr.
- samstarva við Ferðavinnufelag og útbúgvingarstovnar um heiðursmerkir, starvslærupláss og annað, sum kann styðja upp undir áhugan fyri dygdargóðari útbúgving. Vit fara áhaldandi at hava skeið um burðardygd.

5 GENDER EQUALITY

Menniskju og Margfeldi

## Javnstøða millum kyn

**VIT VILJA:**

- arbeiða fyri javnstøðu millum kyn. Tá ið vit hava ráðstevnur, fundir og tiltøk, hava vit altíð fyrilit fyri javnari kynsumboðan.

10 REDUCED INEQUALITIES

Menniskju og Margfeldi

## Minni ójavni

**VIT VILJA:**

- arbeiða fyri at minka um ójavna millum lond. Vit vilja skapa karmar, soleiðis at munur ikki verður gjørdur á fólki. Serliga vilja vit arbeiða fyri, at minnilutabólkar kenna seg hoyra til í okkara vinnu og samfelag. Vit vilja, at útlendsk arbeiðsmegi í okkara vinnu fær eins góð kor og føroysk arbeiðsmegi.

8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

Nýmenning innan Vinnulív og Stjórn

## Sømiligt arbeiði og búskaparligur vøkstur

**VIT VILJA:**

- at ferðavinnan hevur ein árligan búskaparvøkstur, at ferðavinnan hevur eina góða virðisøking og styðjar upp undir íverksetan. Við hesum fer ferðavinnan at breiðka um virksemið í Føroyum og at skapa fleiri áhugaverd størv.
- at ferðavinnufyritøkur í Føroyum hava føroyskan ognarskap.
- hava líka løn fyri sama arbeiði uttan mun til kyn, etniskan uppruna og serligan tørv, og at ein størri partur av arbeiðsstyrkini er ung millum 15 og 24 ár, soleiðis at ferðavinnan verður dragandi fyri hendan aldursbólk.
- sjálv fáa eina umhvørvisgóðkenning og krevja av partnarum og veitarum innan fyri eina freist, at tey eisini hava tað og/ella ein burðardyggan politikk.

Vit keypa lokalar vørur fyrst. Vit ráðgeva gestum um upplivingar, eisini um upplivingarnar, sum ikki vanliga eru eftirspurdar.

11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES

Nýmenning innan Vinnulív og Stjórn

## Burðardyggir býir og bygdir

**VIT VILJA:**

- styrkja nýtsluna av almennum flutningini og burðardyggari ferðslu við at gera tað lættari at brúka almenna samferðslukervið í Føroyum.
- at øll skulu hava atgongd til náttúruna, og at býir, bygdir og náttúra fevnir um øll, eisini fólk við rørslutarni.
- at gestir skulu hava atgongd til súkklur og annan burðardyggan flutning, eins og atgongd til løðistøðir til el-bilar.

12 RESPONSIBLE CONSUMPTION AND PRODUCTION

Nýmenning innan Vinnulív og Stjórn

## Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla

**VIT VILJA:**

- hava eina burðardygga og effektiva nýtslu av okkara náttúruríkidømi.
- minka um matoyðsl.
- minka um nýtsluna av evnafrøðiligum evnum í okkara burturkasti.
- skilja burturkast eftir leiðbeining, soleiðis at so lítið sum gjørligt verður brent og mest møguligt verður endurnýtt. Vit hava ein innkeypspolitikk. Vit hava ein burðardyggan politikk.



# Ferðavinnu-landslagið

Ferðafólk skapa eftirspurning eftir vørum og tænastum frá nógvum ymiskum veitarum í Føroyum. Her síggjast nakrir av høvuðsveitarunum. Harumframt gevur ferðavinnan eisini umsetning hjá øðrum vinnum í Føroyum, so sum byggivinnu, rávøruveitarum, heilsølum, eins og nógvum øðrum tænastuveitingum.

Prýðislutir

Sniðgeving

Bilaleiga

Útferðir

Flogvøllur

Tinganestsøla

Kaffihús

Søvn

Hýruvognar

Heimablídni

Túrveitarar

Bussar

Upplivingarveitarar

Ferjur

Kunningarstovur

Havnir

List

Bensinstøðir

Gávulutir

Klæðir

Matstovur

Ferðaleiðarar

Flogfeløg

Fundar- og veitsluhøli

Havnaumboðsfólk

Gistingarhús

Matvøruhandlar

Summarhús

Kamping

Visit Faroe Islands

Reiðarí

Ferðasmiðir

Vallaraheim

Barrir

Bólog biti

Onnur mentan

Tónleikur

Visit Faroe Islands
Gongin 9
100 Tórshavn

Tlf. 666 555
info@visitfaroeislands.com
www.visitfaroeislands.com

Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands